Mynd: Shell

# Oljupartabrøv og oljuprísiurin lækka í felag

**Jógvan Hugo Gardar**

12.10.2015 - 17:36

Oljan.fo

Aftaná at oljuprísurin um vikuskiftið og fyrrapartin hækkaði, so fór hann aftur at lækka út á seinnapartin.

Klokkan seks í morgun kostaði eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent 53,03 dollarar, meðan amerikanska lættoljan WTI kostaði 50,04 dollarar fyri fatið. Talan er um hægsta oljuprísin í meir enn ein mánað.

Men út á seinnapartin er oljuprísurin aftur farin at lækka. Í løtuni kostar eitt fat av Brent-oljuni 51,97 dollarar fyri fatið, meðan WTI-oljan er farin undir 50 dollarar aftur, og kostar nú 48,54 dollarar fyri fatið.

Lækkingin hevur eisini merkt íleggjararnar á keypsskálanum í Oslo, har olju- og oljuveitingarfeløg hava minkað í virði.

Statoil er lækkað við 2,60 prosentum

Subsea 7 er lækkað við 3,38 prosentum

Seadrill er lækkað við 3,92 prosentum